# Fólkið innaftur í hitan

**Fyriskipararnir til Prix Føroyar finaluna 2003 hava nú gjørt av, at áhoyrararnir í salinum og fólkið heima í stovunum frammanfyri skíggjan, skulu fáa ein leiklut til finaluna. Nú sleppa tey nevniliga at atkvøða um, hvør bólkur skal strúka av við sigrinum**

PRIX
*Ingrid Bjarnastein*



*Nú sleppa fólkini í salinum, og fólkini frammanfyri skíggjan heima við hús eisini at hava ein fingur við í spælinum um, hvør skal strúka avstað við Prix Føroyar sigrinum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Til tvær tær fyrstu Prix Føroyar kappingarnar taldi fólksins rødd við tá avgerðast skuldi, hvør bólkur skuldi sendast víðari í kappingini. Men til triðju ferðina varð fólksins rødd dumpað, tí hon sang ov falskt. Men um vikuskiftið hava fyriskipararnir av Prix Føroyum lovað áskoðarunum innaftur í hitan, og til finaluna sleppa teir at syngja við og hava ein fingur við í avgerðini um, hvør skal strúka avstað við sigrinum.

– Henda broytingin var eitt ynskið frá miðlunum, fyri at fáa hyggjaran og lurtaran meira aktivan, sigur Fróði Vestergaard, samskipari av Prix Føroyum.

### 2 dómarabólkar

Til finaluna seinast vóru 26 dómarar við til at døma finaluna, og ætlanin er, at tað verður um tað sama hesu ferð.

Dómararnir verða býttir í tveir bólkar, har annar bólkurin er inni í salinum, meðan hin dømir útfrá tí, sum er at síggja í sjónvarpi og útvarpi.

Í fyrsta umfari døma dómararnir eftir vanligu fortreytunum, sum teir hava dømt eftir higartil. Tá verða tríggir teir fremstu bólkarnir funnir, og er tað tá fólkið í salinum, hyggjarar og lurtarar, sum sita heima við hús, sleppa at vera við.

Tá kunnu tey, ið hava hug antin senda eini sms-boð til eitt ávíst nummar ella ringja inn, um tey ynskja at gera seg galdandi í atkvøðugreiðsluni. Tey kunnu tó bert atkvøða um tríggjar teir fremstu bólkarnar í kappingini.

– Tað er ikki uttan so, at dómararnir eru rúkandi ósamdir, og atkvøðurnar tískil verða nøkunlunda javnt býttar út millum teir tríggjar bólkarnar, at hyggjaraatkvøðurnar kunnu gera nakran mun. Tí eru dómararnir so nøkunlunda samdir, sum teir hava verið undanfarin ár, so fer tað ikki at broyta úrslitið, sigur Fróði Vestergaard, sum leggur afturat, at í fjør, tá Clickhaze vann, høvdu hyggjaraatkvøður ikki kunnað broytt úrskurðin hjá dómarunum.

Hann sigur eisini, at munur er á nú, og tá fólk kundu atkvøða úr salinum fyri nøkrum árum síðani.

– Fyrr vóru tað bara fólk í salinum, og ikki tey, sum sótu heima, sum sluppu at atkvøða. Og tá var atkvøðugreiðslan eisini lokal. Var Prixið í Suðuroy, so slapp ein suðuroyarbólkur við. Men nú kunnu øll hava ávirkan, greiðir samskiparin frá.

Tað er tó heilt greitt, at tað eru miðlarnir, sum hava ynskt hesa broytingarnar, og sigur Fróði Vestergaard, at hetta er ein semja, sum er komin í lag millum partarnar.

– Hetta er eisini nakað, sum ger, at SvF kann hava eina so góða sjónvarpssending sum møguligt, sigur Fróði Vestergaard, samskipari av Prix Føroyum, at enda.

Birita situr trygg:

# Ongantíð í vanda

**Enn er føroyska Birita á Løgmansbø Bláhamar við í donsku reality-sendirøðini Robinson. Í sendingini mánakvøldið var hon ongantíð í vanda fyri at verða blakað út, og nú vanta bert tríggjar sendingar, áðrenn greitt verður, hvør sleppur við út á oynna í Malaysia**

ROBINSON
*Ingrid Bjarnastein*

8250 fólk teknaðu seg til Robinson í ár. 106 vórðu vald út, og 36 av teimum eru vorðin til tað, tey nú kalla »aspirantar«. Mánakvøldið vóru tey 23 eftir, og enn vanta fimm at verða koyrd úr sendingini.

Í mánakvøldssendingini »Robinson aspiranterne« hjá TV3 var føroyska Birita á Løgmansbø Bláhamar aftur á skíggjanum. Tó var ikki so nógv at síggja og hoyra til hana hesuferð, og hon tykist at vera komin úr vandaøkinum hevur hon ligið í onkrar sendingar.

### 9 víðari

Í ár eru luttakararnir sum altíð býttir upp í tvey lið. Men hesuferð er annað liðið eitt sokallað hyggjaralið og eitt serfrøðingalið. Birita er við á hyggjaraliðnum. Har eru tað hyggjararnir sum hava einarætt til at gera av, hvør skal rúka út úr kappingini. Men tó eftir, at luttakararnir hava valt tvey, sum slagið skal standa ímillum.

Mánakvøldið var royndin, at liðini skuldu bæði fáa flutt seks dekk. Hesi dekkini vóru sett á tveir pelar, sum vóru hálvan fjórða metur til longdar. Trý dekk á hvørjum pela. Liðini skuldu býta um dekkini uppá so stutta tíð sum møguligt, og liðið sum vann, vann eitt fiskanet at taka við út á oynna.

Birita var væl við í royndini. Men hóast tað, so tapti hyggjaraliðið ímóti serfrøðingaliðnum.

Tað merkist heilt týðiliga, at Birita er komin væl inn í liðið aftur. Hon er tikin úr brennideplinum, og er nú ein partur av eini heild, sjálvt um hon tó ikki er ein av teimum, sum tosar mest. Men tí sosiala viðvíkjandi, er hon komin væl við aftur.

Slagið hesaferð stóð millum Fridu, sum fleiri ferðir hevur verið í heita stólinum fyrr, og ein, sum eitur Olrik. Hesuferð valdu hyggjararnir, at Frida skuldi út, og sleppur hon tískil ikki við út á oynna.

Níggju luttakarar úr hyggjaraliðnum sleppa við til Malaysia, og í løtuni eru 12 eftir. Birita tykist ikki vera í vanda fyri at verða blakað út, so tað verður spennandi at síggja, hvør hon verður við á yvirlivilsistúrinum ella ikki.



*Birita á Løgmansbø Bláhamar er við aftur í spælinum um at sleppa út á eina oyggj í Malaysia. Hon tykist ikki vera í vanda fyri, at verða blakað út í næstu framtíð*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri ta stóru samkenslu og hjálpsemi, ið varð sýnd okkum, tá ið okkara góða genta, dóttir og systir

**Synnøva Justinussen**
**Streymnes**

fór til sín seinasta hvíldarstað.

Hjartans tøkk øll somul.

**Ásbjørn, Stefani, Jógvan, Maud, Ólavur og Joan**



# Prixið gongur skeiva vegin

**Líggjas Olsen úr Déja Vu er ein av teimum mongu tónleikarunum, sum heldur, at íkomnu broytingarnar av Prix Føroyum eru til tað verra. – Eg haldi, at Prixið gongur tann skeiva vegin nú, sigur Líggjas Olsen**

PRIX
*Ingrid Bjarnastein*



*Líggjas Olsen úr Déja Vu er ein av mongum tónleikarum, sum er ímót broytingunum, sum eru gjørdar nú beint undan finaluni*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Kjakið gongur heitt inni á tónleikaheimasíðuni pop.fo. Tónleikarar eru í øðini um broytingarnar í Prix Føroyar kappingini, sum vórðu gjørdar um vikuskiftið, og talan hevur enntá verið um at boykotta finaluna.

Fólkið er sloppið innaftur í hitan, og nú sleppur hvør Hanus og Janus, sum hevur hug til tess, at atkvøða um, hvør hann heldur eigur at vera vinnari av Prix Føroyar finaluni.

Men hetta eru nógvir tónleikarar als ikki glaðir fyri. Og ein av teimum er Líggjas Olsen, sum er við í finalubólkinum Déja Vu.

– Eg haldi, at Prix Føroyar gongur tann skeiva vegin nú. Hvør veit, hvussu tað verður næstu ferð. Kanska hyggjararnir tá fara at eiga 50% av avgerðini, sigur ein als ikki fegin Líggjas Olsen.

### Showbusiness

Sjónvarp Føroya hevur leigað Per Zachariassen upp til Føroya, at framleiða finalusendingina í SvF, og heldur Líggjast, at tað er her mistakið liggur.

– Sjónvarpið hugsar meira um at sendingin og sjálvt showið skal vera so gott sum møguligt. Teir leggja upp til, at vit skulu arbeiða fyri teir, ístaðin fyri, at tað er hinvegin runt. Men teir vilja uttan iva tað besta, men hetta er heilt avgjørt eitt mistak, sigur Déja Vu sangarin.

Á vevsíðuni pop.fo spruttar veruliga undir lokinum, og sum sagt, so hevur boykott enntá verið upp á tal.

– Vit eru við uppá ein dialog, men tá vit komu í Norðurlandahúsið leygardagin, so var avgerðin longu tikin. Um vit skulu boykotta, so skulu allir bólkarnir vera við uppá tað, men eg kundi meira hugsað mær eitt skriv ella okkurt líknandi, har vit fingu sagt okkara meining, sigur Líggjas, sum leggur afturat, at hann heldur, at sjónvarpið er tann minst týðandi parturin av kappingini.

– Uttan útvarpið, so var ongin fløga og uttan Norðurlandahúsið, so var onki Prix, tí teir spýta jú nógvar pengar í hesa kappingina. Uttan sjónvarpið so vóru ongar myndir.

Líggjas heldur, at við hesum gongur finalan tnan 26. apríl meira út uppá showið enn nakað annað.

– Ein kennir seg sum eina vøru, sum skal út fyri at sjónvarpið skal fáa eina góða sending heldur enn at vit gera góðan tónleik, sum prixið jú er um, sigur Líggjas Olsen, sangari og ljómborðspælari í finalubólkinum Déja Vu at enda.

Mikkjal Helmsdal:

# Okkara ynski

**Sjónvarpstjórin, Mikkjal Helmsdal, ásannar, at broytingin, sum nú er almannakunngjørd um, at hyggjarar sleppa at atkvøða um, hvør bólkur skal við í finaluna, var eitt ynski frá sjónvarpsins síðu**

PRIX
*Ingrid Bjarnastein*

– Vit hava havt eitt ynski um at lagað finaluna til soleiðis, at hon verður so spennandi sjónvarp sum møguligt, og tað inniber, at tú ført hyggjararnar við, sigur Mikkjal Helsmdal, stjóri í Sjónvarpi Føroya.

– Við tað, at hyggjararnir sleppa at atkvøða, so verður tað meira áhugavert fyri teir.

Sjónvarpsstjórin vísir tó á, at um fakdómararnir eru rímiliga samdir, so fara hyggjaraatkvøðurnar tó ikki at hava so nógv at siga.

– Men tú veitst sjálvandi ikki frammanundan, hvussu úrslitið gerst, so tað kann jú eisini vera, at hyggjararnir koma at hava ein avgerandi leiklut. Vit vænta, at ein stórur partur av Føroya fólki fer at fylgja við í finaluni, sigur Mikkjal Helmsdal.

Orsøkin til, at onki hevur verið tosað um telefon- og smsatkvøður til undanumførini er, at hetta hevur tekniskt ikki latið seg gera.

Til tosið um at Prixið eigur at snúgva seg um góðan tónleik og ikki eitt gott show, sigur Mikkjal Helmsdal:

– Um tað skal vera í sjónvarpinum, skal tað vera eitt gott show. Men tað vil ikki siga, at talan ikki er um góðan tónleik, tí tað eini læsir ikki hitt úti. Men eg skal ásanna, at hesa broytingina hava vit ynskt.

# Tað verður Promise Me lovar Guðrun

**So er endaliga staðfest, at tað er Promise Me, sum Guðrun Sólja Jacobsen fer at syngja í finaluni í "Stjerne for en aften" fríggjakvøldið. - Ein dómarabólkur hevur góðkent hetta, men eg havi vitað tað alla tíðina, sigur Guðrun í telefon úr Keypmannahavn**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*



*Tað verður Promise Me í finaluni fríggjakvøldið, lovar Guðrun í telefon úr Keypmannahavn. Her avmyndað í telefonprátið við ein av mongum fjepparum, áðrenn hon fór til Danmarkar fríggjadagin*

*Mynd: D. Olsen*

Leingi hevur verið ógreitt og nógv hevur verið gitt, men nú er endaliga greitt, at tað verður lagið Promise Me, sum Guðrun syngur í finaluni í "Stjerne for en aften" fríggjakvøldið. Hetta gleðir óivað mong, tí Guðrun er óføra væl dámd við júst hesum lagnum. Eini 84% hava á Portalinum atkvøtt, at hetta skal verða finalulagið. Nærum 9000 hava atkvøtt. Lagið hevur eisini ligið nummar eitt á "15 teim bestu" í vikuvís og er framvegis á odda.

- Nú hevur ein dómarabólkur góðkent sangin. Ikki vanligi dómarabólkurin, sum vit kenna, men teir dómarar, sum eisini vóru við til úttøkuroyndirnar. Men eg havi alla tíðina vitað, at tað skuldi verða Promise Me, sigur Guðrun í telefon úr Keypmannahavn.

### Frítiðarparadís og klæði

Um vikuskiftið hava finaluluttakararnir verið í frítíðarsentrið hjá Dansk Folkeferie í Karrebæksminde.

Har hava tey tikið sær av løttum og gingið túr á strondini.

- Men vit hava eisini gjørt ymiskt, t.d. vant dans og sunnudagin var chatt við lurtarar og hyggjarar á heimasíðuni hjá DR, har fólk settu spurningar og so svaraðu vit, sigur Guðrun.

Týsdagur er settur av til at finna klæðir til finaluna.

- Vit hava øll fingið sponsorar uttanum DR og fara so at finna útav, hvørji klæði vit skulu vera í til finaluna, sigur Guðrun, sum hósdagin skal møta í Forum klokkan 9 til fyrireikingar.

Spurd, hvør teirra er favorittur millum finalistarnar sjálvar, sigur Guðrun:

- Ein tíðindamaður spurdi júst tað sama fyrr í dag. Og svarið er tað sama. Øll eru líka góð. Hetta eru jú seks tey bestu av eini 3 - 4000. Nú kennast vit so mkið væl, ein kennur menniskjuni aftanfyri røddirnar, so tað er sera ringt at meta um, sigur Guðrun.

### Ótrygg framtíð

Guðrun hevur nógv at gera og er biðin at syngja nógvastaðni kring í Føroyum. Men at fáa fatur á Guðrun til tiltøk er ikki longur so lætt, tí allir finalistarnir hava fingið sonevndan managera. John Kristofersen skal taka sær av teimum og teirra uppgávum fram til oktobermánað.

Guðrun hevur eisini sæð kanningina á heimasíðuni hjá BT, har til ber at atkvøða um, hvør finalistur vinnur fyrstaplássið og pening, fløgusáttmála og sangferð kring Danmark í summar. Tarek er á odda og honum á baki kemur Guðrun, sum fegnast um góðu undirtøkuna í Føroyum og í Danmark.

Fløgan við øllum vinnarunum frá undanumførunum er eisini komin, og hon er væleydnað, sigur Guðrun.

Ein grein í BT herfyri upplýsti, at Guðrun eftir summarfrítíðina ætlar sær til Danmarkar at búgva, so meira kann gerast við tónleikin.

- Enn er alt so ótrygt og ilt er at siga nakað um framtíðina. Skúlin er at taka sær av og eg havi sera ringar stundir nú. Má møguliga taka síðsta árið umaftur og tað vil eg eisini fegin. Framtíðin yvirhøvur er eitt sindur ring at sig nakað um júst nú. Eg finni útav tí fríggjadagin, sigur Guðrun Jacobsen.